# INNIHALDSYVIRLIT

1. FORMÆLI LANDSSTÝRISMANSINS....3
2. INNGANGUR....4
3. ALTJÓÐA BÚSKAPURIN....5
3.1 Støðan í altjóða búskapinum....5
3.2 Støðan í norðurlendsku búskapunum....8
3.3 Útlitini fyri altjóða búskapin....11
4. FØROYSKI BÚSKAPURIN....13
4.1 Gongdin í samlaða virkseminum....13
4.2 Gongdin í privata vinnulívinum....16
4.3 Gongdin í privata húsarhaldinum....21
4.4 Gongdin í kommunala búskapinum....21
4.5 Gongdin í fólkatalinum....22
4.6 Gongdin í arbeiðsloysinum....23
4.7 Gongdin í brúkaraprístalinum....24
4.8 Gongdin í fíggjarliga sektorinum....25
4.9 Gongdin á handilsjavna og uttanlandsskuld....26
4.10 Framtíðarútlitini fyri føroyska búskapin....29
5. FÍGGJARLÓGARUPPSKOTIÐ 2006....31
5.1 Búskaparpolitikkurin 2006....31
5.2 Úrslitið á fíggjarlógaruppskotinum 2006....31
5.3 Gongdin í inntøkum landskassans....32
5.4 Gongdin í útreiðslum landskassans....33
5.5 Raðfestingar hjá einstøku landsstýrismonnunum í 2006....35
5.6 Løgur 2006....39
5.7 Gongdin í skuld landskassans....41

Fíggjarmálaráðið
Postboks 2039
FO-165 Argir
Telefon: 35 20 20
Telefax: 35 20 25
**www.fmr.fo**

# 1. FORMÆLI LANDSSTÝRISMANSINS

Búskaparpolitiska høvuðsmálið við fíggjarlógaruppskotinum 2006 er, at fíggjarlógin ikki skal virka tálmandi á føroyska búskapin, nú stígur í nøkur ár hevur verið í búskaparliga virkseminum á fleiri økjum í føroyska samfelagnum.

Føroyski búskapurin er nógv ávirkaður av viðurskiftum uttaneftir og síðstu árini hava fleiri av hesum viðurskiftum havt tálmandi árin á búskaparliga virksemið í Føroyum. Nevnast kann t.d. lágir fiskaprísir, sjúkur í alivinnuni og í seinastuni hava tað serliga verið skjótt vaksandi oljuprísirnir, sum hava nerva føroyska samfelagið.

Føroyska samfelagið er sera bundið av oljuni og tí fara vaksandi oljuprísirnir at krevja tillagingar, soleiðis at føroyingar gerast minni bundnir av oljuni. Tillagingarnar kunnu uttan iva gerast krevjandi í nærmastu framtíð, men landið eigur undir ongum umstøðum at leggja seg út í slíkar tillagingar við t.d. stuðulsskipanum. Hetta hevði bert útsett tillagingartilgongdina og gjørt hana nógv truplari seinni, tí føroyingar kunnu ikki ávirka gongdina í oljuprísunum kortini.

Tað er eftirhondini vorðin ein sannroynd, at í longdini er tað nyttuleyst at arbeiða við viðurskiftum, ið vit ikki kunnu ávirka. Royndirnar vísa eisini, at í vinnuni er tað, hvørki tann sterkasti ella klókasti, ið yvirlivir. Tað er harafturímóti tann, sum er bestur at tillaga seg, ið yvirlivir.

Landsstýrið hevur tí valt at gera eitt fíggjarlógaruppskot, sum ikki órógvar føroyska samfelagið ov nógv í 2006. Landið fer tí hvørki at forða fyri tillagingum ella at leggja stein oman byrði, nú føroyska samfelagið stendur framman fyri stórum avbjóðingum.

***Bárður Nielsen***

# 2. INNGANGUR

Endamálið við hesi frágreiðingini er at skapa betri grundarlag fyri viðgerðini av fíggjarlógaruppskotinum.

Frágreiðingin byrjar við at lýsa gongdina í altjóða búskapinum og ymiskum viðurskiftum, ið hava týdning fyri gongdina og útlitini. Eisini er ein serlig lýsing av gongdini og útlitunum fyri norðurlendsku búskapirnar.

Næsti parturin í frágreiðingini er ein meira nágreinilig lýsing av gongdini og útlitunum í føroyska búskapinum. Gongdin og útlitini í ymiskum týdningarmiklum pørtum í føroyska búskapinum verða lýst við tí vitan og tølum, ið vóru tøk í september 2005.

Triði parturin er um fíggjarlógaruppskotið og búskaparpolitikkin í fíggjarlógaruppskotinum 2006. Ymiskar greiningar eru av inntøkum og útreiðslum landskassans seinastu árini.

Í hesum partinum er eisini eitt stutt yvirlit yvir, hvørjar játtanarligar broytingar eru á málsøkjunum hjá hvørjum einstøkum landsstýrismanni frá fíggjarlógini 2005 til fíggjarlógaruppskotið 2006. Nærri viðmerkingar og grundgevingar fyri broytingunum á einstøku játtanunum eru í viðmerkingunum til hvørja einstaka høvuðskontu í fíggjarlógaruppskotinum.

# 3. ALTJÓÐA BÚSKAPURIN

## 3.1 Støðan í altjóða búskapinum

Rættiliga stórur vøkstur hevur verið í altjóða búskapinum seinastu árini. Í 2004 var altjóða BTÚ[1]-vøksturin omanfyri 5%. Vøksturin hevur ongantíð verið so stórur seinastu 30 árini. Í 2005 og 2006 verður vøksturin mettur til umleið 4%.

Lág renta og lág inflasjón hava skapt góðar fortreytir fyri vøkstri í altjóða búskapinum, men vøksturin hevur samstundis økt nógv um eftirspurningin eftir olju seinastu árini. Eftirspurningurin er methøgur, og oljuprísirnir á heimsmarknaðinum eru meira enn trífaldaðir síðan 2001 og hava ongantíð verið so høgir sum nú, men oljuprísirnir sláa tó ikki met, um teir verða umroknaðir til fastar prísir.[2]

Prísurin á olju og prísurin á pengum (rentan) eru tveir teir týdningarmestu kostnaðirnir fyri gongdina í altjóða búskapinum. Søguliga lága rentan hevur verið høvuðsorsøkin til stóra búskaparvøksturin seinastu árini, og vaksandi oljuprísirnir eru nú størsti vandin fyri einum hóttafalli í altjóða búskapinum.

Lág renta, stórur búskaparvøkstur og vaksandi oljuprísir eru alt partar av einari samanhangandi búskaparligari tilgongd, sum verður lýst nærri niðanfyri.

USA og Kina eru nógv teir týdningarmestu búskapirnir í altjóða búskapinum. Tí hevur búskaparliga gongdin í USA og Kina stóran týdning fyri samlaðu gongdina í altjóða búskapinum. Lága rentan hevur stimbrað eftirspurningin og økt nýtsluna munandi í hesum báðum búskapunum seinastu tvey árini. USA og Kina umboða eisini nógv tann størsta vøksturin í eftirspurninginum eftir olju á heimsmarknaðin-

[1] Bruttotjóðarúrtøkan, BTÚ, er eitt mát fyri ta vinnuligu inntøkuskapanina, sum framleiðsluvirðið minus rá- og hjálpievni.

[2] Oljuprísirnir hava í seinastuni ligið omanfyri 60 $ fyri tunnuna. Hevði oljupísurin í 1980, sum var næstan 40 $ fyri tunnuna, verið umroknaður til dagsins prísir, so hevði prísurin verið næstan 100 $ fyri tunnuna.

um. USA er harafturat størsti brúkarin av olju í heiminum. USA brúkar 50% meira í olju enn ES-londini fyri hvønn dollara av BTÚ.

Eftirspurningurin eftir olju í USA og Kina er øktur meira enn verandi framleiðsluorka megnar at framleiða, og tí eru prísirnir á olju vaksnir so nógv. At vaksandi oljuprísirnir hava við sær, at vøksturin í altjóða búskapinum er eitt sindur minni nú, enn hann var í 2004, er tí ikki eitt krepputekin, men heldur eitt natúrligt aftursvar til skjótt vaksandi eftirspurningin, soleiðis at altjóða búskapurin ikki verður ovurupphitaður.

Av tí at relativi kostnaðurin á olju er lægri í dag, enn hann var fyrr, hava búskaparligu avleiðingarnar av vaksandi oljuprísunum enn ikki verið so ógvisligar. At relativi kostnaðurin er vorðin minni merkir, at oljuútreiðslur nú eru ein lutfalsliga minni partur av samlaðu útreiðslunum í dagliga húsarhaldinum, bæði hjá vinnu og privata húsarhaldinum. Tað er tó ymiskt, hvussu bundin ymisk lond eru av olju.

Tað er lítið sannlíkt, at eftirspurningurin eftir olju verður minni frameftir. Síðan 2000 hava kinverjar einsamallir umboða ein triðing av samlaða vøkstrinum í eftirspurninginum eftir olju á heimsmarknaðinum, men kinverjar umboða framvegis bert umleið 8% av samlaðu oljunýtsluni í heiminum, USA umboðar ein fjórðing av samlaðu nýtsluni. Til samanberingar kann nevnast, at kinverjar standa fyri 31% av kolnýtsluni, 27% av stálnýtsluni, og teir keypa 27% av øllum sjónvarpum og 35% av sigarettunum, sum verða seld á heimsmarknaðinum. Heldur búskaparligi vøksturin í Kina fram, er tí mest sannlíkt, at oljunýtslan hjá kinverjum fer at økjast munandi frameftir.

Tað skal eisini viðmerkjast, at fleiri menningarlond, har búskaparligi vøksturin er stórur, nýta lutfalsliga meira olju enn framkomin ídnaðarlond til somu framleiðslunøgd. Herumframt veita nógv nýliga framkomin menningarlond oljustuðul. Bæði Kina og India veita oljustuðul, soleiðis at oljunýtslan minkar ikki sam-

svarandi vaksandi prísunum á heimsmarknaðinum, tí oljustuðulin setir marknaðar-kreftirnar úr gildi.

Tað eru sostatt búskaparligu risarnir USA og Kina, ið eru drívmegin aftan fyri vøksturin í altjóða búskapinum. Stórur vøkstur er eisini í indiska búskapinum, sum fram eftir fer at fáa størri týdning í altjóða búskapinum. Lítil búskarparligur vøkstur hevur haraftur ímóti verið í Japan og Evropa.

Í Japan var næstan eingin búskaparligur vøkstur í 2004, og metingarnar vísa bert eina lítla framgongd í 2005 og 2006. Orsøkin til viknaða japanska búskapin í 2004 kemst m.a. av lægri altjóða eftirspurningi eftir KT-útbúnaði, sum hevur minkað japanska útflutningin, japansku íløgurnar og privatu nýtsluna í Japan.

Munandi framgongd var í búskaparliga vøkstrinum í evrulondunum í 2004, men hon minkar aftur í 2005. Hetta kemst m.a. av, at samansparingin í Týsklandi framvegis veksur, og at kappingarevnini í fleiri londum eru versnað. Víðkanin av ES hevur eisini týdning í hesum sambandi.

Styrkta evran er ein orsøk til versnandi kappingarføri, men týdningarmesta orsøkin eru stórir trupulleikar við bygnaðinum á arbeiðsmarknaðinum. Arbeiðs-marknaðurin hevur ilt við at tillaga seg herdu kappingina úr láglønarlondunum. Í fleiri londum verður mett, at frægasta loysnin á bygnaðarligu trupulleikunum á arbeiðsmarknaðinum er útbúgving, tí tað verða fólk uttan útbúgving, ið verða størstu tapararnir í kappingini við láglønarlondini.

Í evrulondunum hava vaksandi oljuprísirnir minkað innlendska eftirspurningin. Mett verður, at altjóða hákonjunkturin stigvíst fer at stimbra útflutningin og virksemið í evrulondunum. Í 2005 verður vøksturin í BTÚ mettur til 1,5%, og í 2006 verður hann mettur til 2%.

## 3.2 Støðan í norðurlendsku búskapunum

Rættilig ferð kom á norðurlendsku búskapirnar í 2004, tá vøksturin í BTÚ var 3,1% ímóti 1,2% í 2003, sí talvu 3.1. Metingarnar fyri 2005 og 2006 eru eisini góðar. Í flestu londunum er inflasjónin lág og arbeiðsloysið er lágt og minkandi, men tølini eru ymisk í ymsu londunum. Øll londini, uttan Ísland, hava havt stór avlop á gjaldsjavnanum, sí talvu 3.2.

**Talva 3.1: Árligur BTÚ-vøkstur í evru- og norðanlondum**

| *BTÚ-vøkstur í %* | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Evrulondini | 3,5 | 1,6 | 0,9 | 0,5 | 2,1 | 1,5 | 2,0 |
| Danmørk | 2,8 | 1,3 | 0,5 | 0,7 | 2,4 | 2,4 | 2,1 |
| Svøríki | 4,3 | 1,0 | 2,0 | 1,5 | 3,5 | 3,2 | 2,7 |
| Noreg | 2,8 | 2,7 | 1,1 | 0,4 | 2,9 | 3,6 | 2,0 |
| Finnland | 5,1 | 1,1 | 2,2 | 2,4 | 3,7 | 3,3 | 2,7 |
| Ísland | 5,7 | 2,6 | -2,1 | 4,2 | 5,2 | 5,9 | 5,7 |
| Norðurlond | 3,8 | 1,5 | 1,5 | 1,2 | 3,1 | 3,1 | 2,4 |

*Kelda: Norðurlandaráðið og ES-nevndin.*

**Talva 3.2: Búskaparlig lyklatøl í norðanlondum**

| | Gjaldsjavni | | | Arbeiðsloysið | | | Inflasjón | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2004** | **2005** | **2006** | **2004** | **2005** | **2006** | **2004** | **2005** | **2006** |
| | - - - - - % av BTÚ - - - - - | | | - - - - Ársmiðal í % - - - - | | | - - - - - - - % - - - - - - - | | |
| Finnland | 4,2 | 3,9 | - | 8,8 | 8,4 | 8,0 | 0,2 | 1,2 | 1,4 |
| Ísland | -8,1 | -12,1 | -11,4 | 3,1 | 2,4 | 2,2 | 3,2 | 3,9 | 3,8 |
| Noreg | 17,1 | 18,1 | 18,1 | 4,5 | 4,3 | 4,1 | 0,4 | 1,3 | 1,8 |
| Svøríki | 8,1 | 7,8 | 8,2 | 5,5 | 5,0 | 4,4 | 0,4 | 0,5 | 1,5 |
| Danmørk | 3,0 | 3,0 | 3,4 | 6,1 | 5,4 | 5,1 | 1,1 | 2,0 | 1,8 |

*Kelda: Norðurlandaráðið.*

Í Svøríki var vøksturin í BTÚ 3,5% í 2004 ímóti 1,5% í 2003. Stórur útflutnings-vøkstur hevur verið drívmegin í svenska búskaparvøkstrinum. Lág renta og hægri realløn hevur stimbrað privatu nýtsluna, meðan vinnuíløgurnar eru stimbraðar av lagaligum fíggjartreytum og fullgóðari nyttu av framleiðsluorkuni. Hóast eftir-spurningurin eftir svenskari framleiðslu er nógv vaksin, er arbeiðsloysið ikki nógv minkað. Hetta kemst av, at framleidnissvøksturin (produktivitetsvøksturin) eisini

hevur verið stórur. Hægri gjaldoyrakursir hava viðført bíligari innflutning, og tí er inflasjónin lítil.

Í Finnlandi var vøksturin í BTÚ 3,7% í 2004 ímóti 2,4% í 2003. Her hevur innlendski eftirspurningurin verið drívmegin í vøkstrinum. Skattalættar og lág inflasjón hava givið stóran reallønarvøkstur, sum hevur stimbrað privatu nýtsluna. Samstundis eru privatu íløgurnar vaksnar nógv eftir afturgongd í 2002 og 2003. Framgongd er í útflutninginum, og mett verður, at fram eftir verður vøksturin í útflutninginum drívmegin í finska búskapinum. Arbeiðsloysið fer væntandi at minka við økta virkseminum. Ein orsøk til lægri inflasjón í 2004 eru lægri avgjøld á tubakk og rúsdrekka.

Eftir ein lítlan vøkstur í 2003 vaks BTÚ í Noreg 3,5% í 2004. Ekspansivur pengapolitikkur hevur økt munandi um realinntøkuna hjá húsarhaldunum, og stórur vøkstur í privatu nýtsluni hevur verið drívmegin í stóra vøkstrinum í norska búskapinum. Stórur vøkstur hevur eisini verið í íløgunum, og bústaðarbyggingin er nógv økt. Útflutningurin hevur ikki stimbrað norska búskapin seinastu árini, nettoútflutningurin hevur havt tálmandi árin á norska BTÚ-vøksturin. Vøksturin í norska búskapinum hevur minkað arbeiðsloysið. Inflasjónin var lítil í 2004, men fer væntandi at vaksa, tá avleiðingarnar av styrktu norsku krónuni fara at minka.

Í Íslandi var vøksturin í BTÚ 5,2% í 2004. Drívmegin í Íslandi hevur verið stórur vøkstur í privatu nýtsluni og íløgunum. Stóri eftirspurningurin í Íslandi hevur havt vaksandi hall á gjaldsjavnanum við sær. Vøksturin í virkseminum fer væntandi at halda fram, m.a. tí fleiri íløgur verða gjørdar í orkuframleiðsuna. Arbeiðsloysið er lítið og minkar. Stóri eftirspurningurin í Íslandi og vaksandi orkuprísir hava ført við sær, at inflasjónin veksur.

Í Danmørk var vøksturin í BTÚ 2,4% í 2004 ímóti 0,7% í 2003. Lág renta og ekspansiv tiltøk í tí sokallaða ”Várpakkanum” hjá donsku stjórnini[3] hava ført til

[3] ”Várpakkin” hjá donsku stjórnini er ein pakki við ekspansivum fíggjarpolitiskum tiltøkum. Í pakkanum eru m.a. skattalættar, inngjøld til tvungna samansparing verða fyribils sett úr gildi,

stóra framgongd í privatu nýtsluni, sum er drívmegin undir stóra vøkstrinum í Danmørk. Samstundis hevur framgongd verið í vinnuíløgunum og útflutninginum. Arbeiðsloysið er farið at minkað og inflasjónin er framvegis lág. Fyri Danmørk hevur vaksandi oljuprísurin eisin gagnlig árin, tí Danmørk er nettoútflytari av olju.

Seinastu 5 árini hevur vøksturin í BTÚ verið størri í norðanlondum enn í stóru evrulondunum, sí talvu 3.3. Tað eru uttan iva fleiri orsøkir til hesa gongd. Framleidnisvøksturin hevur verið størri, tí norðanlond hava brúkt nýggjastu tøknina. Norðurlendsku arbeiðsmarknaðirnir eru smidligari, arbeiðsloysið er minni og evnini at tillaga seg broyttar umstøður eru størri. Stór avlop hava verið á almennu fíggjarlógunum, og tí eru almennu búskapirnir eisini betri konsolideraðir.

**Talva 3.3: Vøkstur í ídnaðarframleiðslu í evrulondum og norðanlondum**

| *Árligur vøkstur í %* | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** |
|---|---|---|---|---|---|
| **Norðanlond:** | | | | | |
| -Danmørk | 3,3 | 0,0 | -0,4 | -0,1 | -1,3 |
| -Finnland | 11,0 | 0,3 | 2,1 | 1,1 | 4,8 |
| -Svøríki | 8,2 | -1,5 | 4,5 | 1,9 | 8,3 |
| -Noreg | 3,8 | 1,8 | 0,6 | -2,0 | - |
| -Ísland | 6,3 | 2,4 | -2,3 | 2,0 | 4,6 |
| **Evrulond:** | | | | | |
| -Týskland | 4,6 | -1,3 | -0,4 | 0,5 | 4,3 |
| -Spania | 3,9 | 2,4 | 0,7 | 1,3 | - |
| -Frakland | 4,3 | 2,9 | 0,8 | -0,1 | - |
| -Italia | 2,3 | -0,3 | -0,3 | -1,0 | 0,3 |
| -Niðurlond | 3,4 | 0,3 | -0,4 | -2,5 | - |

Kelda: Norðurlandaráðið.

Seinastu árini hevur vøksturin í ídnaðarframleiðslu verið minkandi, bæði í norðanlondum og teimum stóru evrulondunum, sí talvu 3.3. Framgongdin í tænastuvinnunum tykist samstundis at hava verið størri í norðanlondum enn í stóru evrulondunum, sí talvu 3.4.

alment byggjarí og aðrar almennar íløgur verða øktar, fleiri eftirútbúgvingar og aðrar útbúgvingar verða settar í verk og ymiskt annað.

**Talva 3.4: Vøkstur í tænastuvinnum í evrulondum og norðanlondum**

| *Árligur vøkstur í %* | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** |
|---|---|---|---|---|---|
| **Norðanlond:** | | | | | |
| -Danmørk | 3,6 | 2,7 | 1,7 | 0,8 | 2,1 |
| -Finnland | 4,3 | 2,2 | 2,3 | 3,0 | 3,7 |
| -Svøríki | 3,4 | 1,2 | 1,1 | 1,8 | 1,9 |
| -Noreg | 3,3 | 4,1 | 1,6 | 2,2 | - |
| -Ísland | 6,5 | 4,2 | 0,7 | 4,0 | 6,3 |
| **Evrulond:** | | | | | |
| -Týskland | 3,6 | 2,7 | 0,9 | 0,4 | 1,3 |
| -Spania | 4,6 | 3,9 | 1,7 | 2,1 | - |
| -Frakland | 4,0 | 2,0 | 1,9 | 1,0 | - |
| -Italia | 4,2 | 2,8 | 1,0 | 0,9 | 1,2 |
| -Niðurlond | 3,7 | 2,0 | 1,1 | 0,2 | - |

Kelda: Norðurlandaráðið.

## 3.3 Útlitini fyri altjóða búskapin

Altjóða búskapurin er sostatt í einum hákonjunkturi í løtuni og í flestu londunum er lág renta, lág inflasjón og lágt arbeiðsloysi. Útlitini fyri framhaldandi vøkstri eru góð, men ótrygga støðan á altjóða oljumarknaðinum skapar óvissu um nærmastu framtíð.

Flestu oljuframleiðandi londini hava næstan nátt markinum fyri, hvussu nógva olju tey yvirhøvur kunnu framleiða. Prísurin á olju er tí sera viðbrekin fyri møguligum órógvi, sum kann raka oljuframleiðsluna ella oljuveitingarnar.

Hetta kom týðiliga fram, tá ið ódnin Katrina herjaði í USA fyri stuttari tíð síðan. Ódnin legði fleiri oljureinsiverk lamin, og prísirnir á olju og serliga bensini fóru alt fyri eitt upp. Tað fer at taka nakað av tíð, áðrenn framleiðslan í USA kemur í rætt lag aftur.

Afturat hesum kemur spenta støðan í miðeystri og vandin fyri yvirgangi ímóti oljuframleiðslu og oljuveitingum, sum skapar fjáltur á oljumarknaðin, og leggur stóran eykakostnað á oljuna í váðaviðbót. Henda váðaviðbótin hevur verið stór, síðan kríggið ímóti Irak byrjaði í mars 2003, men hon er nú vorðin enn størri.

Oljuprísurin verður sera viðbrekin í nærmastu framtíð. Mett verður tí, at prísirnir fara at vera høgir restina av árinum. Í ringasta føri kann gongdin í miðeystri og yvirgangsatsóknir føra til hóttafall í altjóða búskapinum í nærmastu framtíð.

Hetta er tó bert í nærmastu framtíð, tí tað er sera torført at siga nakað um, hvussu gongdin verður í oljuprísunum longur fram í tíðina. Tað er nokk til av olju, men framleiðsluorkan er ov lítil í løtuni.

Nakrir oljumarknaðarserfrøðingar meta, at frameftir fer oljuprísurin at liggja um 40 $ fyri tunnuna, meðan aðrir meta, at prísurin fer at liggja um 180 $ fyri tunnuna. Hetta vísir, hvussu trupult tað er at siga nakað um oljuprísin frameftir. Semja tykist tó at vera um, at oljuprísurin fer ikki at koma niður aftur á 20 $ fyri tunnuna.

Vaksandi oljuprísirnir hava skapt inflasjónstrýst í fleiri londum, men eingi útlit eru fyri rentuhækkingum í nærmastu framtíð.

# 4. FØROYSKI BÚSKAPURIN

Føroyski búskapurin er ein sera lítil og opin búskapur í altjóða samanhangi. Sereyðkenni hjá einum lítlum og opnum búskapi er stórur uttanlandshandil og stór luttøka í altjóða arbeiðsdeilingini, samstundis sum lítli búskapurin onga ávirkan hevur á gongdina í altjóða búskapinum.

Lítli og opni føroyski búskapurin má sostatt góðtaka og tillaga seg viðurskiftum uttaneftir. Hetta merkir m.a., at í longdini kunnu føroyingar ikki berjast ímóti ella seta tiltøk í verk, soleiðis at t.d. vaksandi oljuprísurin ikki skal ávirka gongdina í føroyska búskapinum. Loysnin er harafturímóti, at føroyingar gera seg minni bundnar av oljuni við at fara at nýta meiri orkusparandi framleiðsluhættir og fleiri alternativar orkukeldur.

Tað eru ikki bert búskaparlig viðurskifti uttaneftir, ið føroyski búskapurin má tillaga seg eftir. Náttúruviðurskifti, t.d. støðan hjá fiskastovnunum og smittandi sjúkur í alifiski, hava eisini stóra ávirkan á fortreytirnar fyri búskaparliga virkseminum, soleiðis sum føroyski búskapurin er samansettur.

Føroyski búskapurin er sostatt rættiliga viðbrekin mótvegis viðurskiftum uttan-eftir. Seinastu árini hava viðurskifti uttaneftir verið tálmandi fyri virksemið í føroyska búskapinum. Fiskaprísirnir hava verið lágir, oljuprísirnir vaksandi, alivinnan hevur havt sjúkutrupulleikar og arbeiðspláss í primervinnuni eru flutt til láglønarlond. Tálmandi ávirkanin uttaneftir og alheimsgerðin seta stór krøv til føroyskan búskap og búskaparpolitikk.

## 4.1 Gongdin í samlaða virkseminum

Búskaparliga gongdin verður vanliga lýst við at vísa gongdina í bruttotjóðar-úrtøkuni, BTÚ, men av tí at føroyska bruttotjóðarúrtøkan ikki er gjørd upp í føstum prísum og leypandi uppgerðin heldur ikki er dagførd, er gongdin í

føroysku bruttotjóðarúrtøkuni ikki serliga nýtiligt mát til at vísa gongdina í búskapinum.

Tað finnast harafturímóti sera góðar og dagførdar skrásetingar av lønarútgjaldingunum í Føroyum. Lønarútgjaldingarnar svara til yvir helmingin av BTÚ, og gongdin í lønarútgjaldingunum umvegis a-skattaskipanina geva tí eina góða ábending um gongdina í virkseminum í føroyska búskapinum.

Tað er framvegis vøkstur í samlaðu lønarútgjaldingunum í Føroyum. Fyrstu 8 mánaðirnar í ár var vøksturin í lønarútgjaldingunum umvegis a-skattaskipanina 2,1% samanborið við somu tíð í fjør, sí mynd 4.1.

**Mynd 4.1: Lønarútgjaldingar umvegis a-skattaskipanina, 1996-2005**




Vøksturin í lønarútgjaldingunum hevur verið væl lægri síðstu 3 árini enn síðstu árini í 1990-árunum og fyrstu árini í hesi øldini, sí talvu 4.1.

**Talva 4.1: Vøkstur í lønarútgjaldingum, januar-august**

| *Vøkstur í %* | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vøkstur í lønarútgjaldingum | 5,9 | 6,8 | 10,1 | 12,2 | 6,3 | 0,9 | 3,3 | 2,1 |

Tað er tó stórur munur á gongdini í lønarútgjaldingunum í ymisku vinnugreinunum, sí talvu 4.2. Fyri at lýsa hvønn týdning ymisku vinnurnar hava fyri búskaparligu gongdina, kunnu vinnugreinirnar býtast upp í 4 høvuðsbólkar, sum eru tilfeingisvinna, vinnur innan vøruframleiðslu, privatar tænastur og almennar tænastur.

*Tilfeingisvinna* er landbúnaður, fiskiskapur, ali- og kryvjivirki og ráevnisvinna. *Vinnur innan vøruframleiðslu* eru fiskavøruídnaður, skipasmiðjur, aðrar smiðjur, ídnaður annars, byggivinna og orkuveiting. *Privatar tænastuvinnur* eru handil og umvæling, gistingarhús og matstovur, sjóflutningur og flutningur annars, postur og fjarskifti, fígging og trygging, vinnuligar tænastur, húshaldstænastur, felagskapir og mentan og ótilskilað vinna. *Almennar tænastur* er almenn fyrisiting, allar almennar tænastur og alt annað virksemi, sum tað almenna fíggjar við sínum lønarúteiðslum.

**Talva 4.2: Lønargjaldingar skiftar á vinnugrein, 2000-2004**

| *Mió. kr.* | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** |
|---|---|---|---|---|---|
| Landbúnaður | 6,4 | 6,3 | 6,5 | 6,5 | 7,3 |
| Fiskiskapur | 804,9 | 955,9 | 1.009,2 | 874,2 | 777,1 |
| Ali- og kryvjivirki | 124,5 | 158,6 | 160,4 | 128,7 | 91,6 |
| Ráevnisvinna | 14,4 | 71,1 | 37,9 | 34,1 | 21,6 |
| Fiskavøruídnaður | 345,4 | 372,5 | 412,5 | 410,7 | 396,3 |
| Skipasmiðjur og smiðjur | 107,9 | 123,6 | 130,1 | 130,9 | 127,7 |
| Ídnaður annars | 176,6 | 199,4 | 217,7 | 222,6 | 217,1 |
| Bygging | 261,1 | 302,8 | 345,7 | 348,4 | 385,0 |
| Orkuveiting | 39,8 | 43,0 | 46,7 | 46,3 | 50,3 |
| Handil og umvæling | 455,8 | 505,4 | 568,1 | 588,3 | 594,8 |
| Gistihús og matstovur | 51,9 | 55,4 | 62,6 | 70,2 | 65,4 |
| Sjóflutningur | 192,3 | 211,8 | 255,7 | 257,1 | 260,9 |
| Flutningur annars | 96,7 | 123,5 | 143,5 | 138,2 | 143,0 |
| Postur og fjarskifti | 132,0 | 147,0 | 156,4 | 161,9 | 165,1 |
| Fígging og trygging | 205,2 | 213,4 | 222,8 | 224,9 | 234,2 |
| Vinnuligar tænastur | 131,3 | 148,0 | 159,9 | 178,3 | 192,7 |
| Húshaldstænastur | 28,0 | 31,4 | 36,0 | 36,5 | 40,1 |
| Almenn fyrisiting og tænastur | 1.490,1 | 1.623,6 | 1.767,9 | 1.868,7 | 2.031,0 |
| Felagsskapir og mentan | 82,7 | 102,0 | 102,1 | 147,5 | 118,3 |
| Ótilskilað vinna | 32,0 | 37,6 | 39,3 | 32,7 | 42,6 |
| **Tilsamans** | **4.779,1** | **5.432,4** | **5.881,3** | **5.906,6** | **5.962,2** |

Kelda: Hagstova Føroya

Almennar og privatar tænastur eru vorðnar ein størri partur av føroyska búskapinum seinastu árini, sí talvu 4.3. Í 2000 vóru tær 60,7% og í 2004 vóru tær 65,2% av samlaðu lønargjaldingunum. Sama tíðarskeið eru lønargjaldingarnar í tilfeingisvinnunum minkaðar nógv. Í 2000 vóru tær 19,9% og í 2004 vóru tær 15,1% av samlaðu lønargjaldingunum. Í vøruframleiðsluvinnunum hevur gongdin verið støðug. Í 2000 vóru lønargjaldingarnar í vøruframleiðsluvinnunum 19,5% og í 2004 vóru tær 19,7% av samlaðu lønargjaldingunum.

Tað er sostatt vøksturin í privatu og almennu tænastuvinnunum, sum er orsøkin til, at størri afturgongd hevur ikki verið í føroyska búskapinum seinastu árini, hóast stór afturgongd hevur verið í tilfeingisvinnunum.

**Talva 4.3: Býti av lønargjaldingum á høvuðsbólkar, 2000-2004**

| *%-býti* | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** *jan.-aug.* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tilfeingisvinnur | 19,9 | 21,9 | 20,6 | 17,6 | 15,1 | 14,2 |
| Vøruframleiðsla | 19,5 | 19,2 | 19,6 | 19,6 | 19,7 | 18,4 |
| Tænastuvinnur | 29,5 | 29,0 | 29,7 | 31,1 | 31,1 | 31,7 |
| Almennar tænastur | 31,2 | 29,9 | 30,1 | 31,6 | 34,1 | 35,8 |
| Tilsamans | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 |

Kelda: Hagstova Føroya

## 4.2 Gongdin í privata vinnulívinum

Høvuðsorsøkin til afturgongdina í lønarútgjaldingunum í tilfeingisvinnunum er afturgongdin í fiskivinnuni á landi og fiskiskapinum eftir toski, hýsu og upsa á landgrunninum. Hetta eru týdningarmestu fiskasløgini, ið verða veidd rundan um Føroyar, tí veiðan hevur stórt virði og stórur partur av veiðini verður virkað á føroysku fiskavirkjunum. Virðið av toskafiskiskapinum minkaði næstan 30% í 2004. Afturgongdin helt fram fyrra hálvár í ár, men prísirnir eru nú vaksandi aftur, og í august í ár vóru lønargjaldingarnar munandi størri enn í august í fjør. Tí eru lønargjaldingarnar í fiskivinnuni fyrstu átta mánaðirnar í ár á næstan sama støði sum í fjør.

Í sínum seinasta tilmæli frá juni í ár, mælir Fiskirannsóknarstovan til, at veiðitrýstið eftir toski, hýsu og upsa verður munandi minkað, men Løgtingið samtykti í august, at veiðitrýstið stórt sæð verður óbroytt.

Eftir óvanliga góðu árini í 2000 og 2001 var størsti parturin av fiskiflotanum, rækjuflotin undantikin, framvegis væl fyri í 2004, og flotin tykist tí at vera væl konsolideraður. Skipini, ið royna eftir uppisjóarfiski, hava gott fiskarí og fáa góðan prís. Flakatrolararnir hava eisini gott avkast. Tað eru serliga lemmatrolarar, partrolarar og nótaskipini, ið merkja vaksandi oljuprísirnar.

Virksemið í rækjuvinnuni er minkað sera nógv í hesum árinum. Fyrr í ár vóru 5 rækjutrolarar í vinnu, men nú er bert 1 eftir. Hetta gevur føroysku rækjuvinnuni stórar trupulleikar við at fáa fatur á rávøru, so leingi eingin kumuleringsavtala er sett í verk. Við einari kumuleringsavtalu kundi føroyska rækjuvinnan keypt rávøru aðrastaðni, uttan at rávøran verður roknað sum 3. landsvøra, tá ið hon verður flutt út til ES. Vónandi verður henda avtala fingin í lag um stutta tíð.

Í Føroyum, Noregi og Íslandi er hørð kapping í rækjuvinnuni, og rækjuvinnan í hesum londunum vísir seg ikki at geva nakran vinning. Í Kanada og Grønlandi er støðan øðrvísi, tí hesi londini hava nokk av rávøru. Útboðið av pilkaðum rækjum, serliga úr Kanada, er nógv økt og hetta leggur stórt trýst á prísirnar á evropeiska marknaðinum, sum liggur um góðar 30 kr./kilo. Útboðið vísir seg at vaksa, og kappingin við aldar heittvatnsrækjur økist. Tað eru tí eingi útlit fyri, at prísirnir á rækjum fara at hækka.

Verandi marknaðarprísur gevur ov lítið avkast til føroysku rækjuskipini, sum hava veiðirættindi við Svalbard og Flemish Cap. Verandi marknaðarprísur gevur skipunum 6 kr./kg. Sambært kanning hjá Fiskimálaráðnum fyri 2 árum síðan, skulu skipini hava dupult so høgan prís fyri at fáa nøktandi avkast við verandi kvotum.

Harða kappingin frá láglønarlondum og fallandi fiskaprísir síggjast aftur í samlaða úrslitinum hjá fiskivinnuni á landi. Sambært Føroya Ráfiskakeyparafelag var samlaða avlopið hjá fiskivinnuni 45 mió. kr. í 2002, men avlopið er nú vent til eitt hall, sum í 2004 var 30 mió. kr. Fiskivinnan á landi hevur ikki merkt so nógv til vaksandi oljuprísirnar, tí so at siga allar maskinur til fiskaframleiðslu á landi nýta el-orku, og elprísirnir eru enn ikki ávirkaðir av vaksandi oljuprísunum.

Føroysku fiskavirkini framleiða í høvuðsheitinum saltfisk og frystar portiónir, serliga úr upsa. Herumframt eru fleiri sokallaðar nissjuframleiðslur, t.d. saltað longa og brosma, fesk fløk, havtaska og svartkalvi.

Prísurin á saltaðum fiski er á leið tann sami sum í fjør, men nøgdin er minni, og tí verður ikki roknað við nøkrum avkasti í ár. Av tí at lítið er til av rávøru, flyta framleiðarnir seg inn á øki hjá hvørjum øðrum. Kappingin er tí harnað millum nissjuframleiðararnar.

Portiónsframleiðslan úr upsa hevur verið støðug, men kappingin á altjóða marknaðinum er hørð, og tí hevur henda framleiðslan ikki givið nakað avkast. Útflytarar av rundum fiski hava givið hægsta prísin, og tí er rávøruprísurin á upsa hækkaður.

Framleiðslan úr feskum fiski, t.d. havtasku, er lønandi í ár, men hesin parturin av framleiðsluni er lítil samanborin við vanligu fiskasløgini. Vanligu fiskasløgini eru toskur, hýsa og upsi. Føroyingar klára seg í kappingini um toskin, sum verður framleiddur til saltfisk og útfluttur til Spaniu og Italiu. Hýsa og upsi hevur verið framleiddur til frystar vørur, og her hevur kappingin frá láglønarlondunum verið sera hørð. Alternativið til frystu vørurnar eru feskar vørur úr hýsu, upsa og smáa toskinum, men føroysku flakavirkini hava ikki lagt seg eftir hesi framleiðsluni. Tí fer so stórur partur av hýsuni og upsanum av landinum sum rundur fiskur til feskfiskaframleiðslu serliga í Bretlandi og Fraklandi.

Virksemið í alivinnuni er nógv minkað. Tøkan av laksi og sílum var 43.000 tons í 2003 og verður væntandi 16.000 tons í ár, sí talvu 4.4. 90% av útflutninginum hjá føroysku alarunum er feskur laksur og laksaportiónir. Prísurin á laksaportiónunum hevur verið rættiliga støðugur og liggur um 47,60 kr. fyri portiónina. Portiónsvirkini hava havt góð ár, meðan rávøruprísurin hevur verið lágur.

Prísurin á feskum laksi lækkaði á heysti í 2001 og hevur verið sera lágur síðstu árini. Í 2004 hækkaði prísurin aftur, og prísurin er hækkaður munandi í ár. Við fyrivarni verður mett, at miðalprísurin í ár fer at liggja um 23 kr./kg. Hesin prísurin er oman fyri framleiðslukostnaðin, og alarar fara tí at fáa avkast í ár.

**Talva 4.4: Gongdin í alivinnuni, 2003-2005**

| *Ymisk lyklatøl* | **2003** | **2004** | **2005** |
|---|---|---|---|
| Tøka av laksi og sílum (tons í kruvdari vekt) | 43.000 | 37.000 | 16.000 |
| Miðalprísururin á frystum laksaportiónum | 50,70 | 47,60 | 47,60 |
| Miðalkiloprísurin á feskum laksi | 16,35 | 18,20 | 23,00 |

Orsøkin til príshækkingarnar er, at samlaða útboðið úr Noregi, Skotlandi, Írlandi og Føroyum er ikki vaksið, samsvarandi vaksandi eftirspurninginum. Jøvn prís-sveiggj eru fyri feskan laks, har tvey til trý ár eru millum toppar og botnar. Í 1994 var prísurin høgur, í 1997 var hann lágur fyri so at toppa aftur í 2000. Prísurin hevur nú verið lágur í 2002 og 2003 og fer tí at toppa í ár og í næsta ár. Um henda gongdin heldur fram, lækkar prísurin aftur í 2008.

Orsøkin til hesa gongd er, at framleiðslutíðin á laksi er 2 til 3 ár. Høgt avkast eggjar alarum til at økja um framleiðsluna. Hendan framleiðslan rakar síðan marknaðin 2 til 3 ár seinni, og tá fellur prísurin. Tá fáa alarar gjaldføris-trupulleikar og minka um framleiðsluna, sum aftur viðførir, at prísurin hækkar aftur 2 til 3 ár seinni. Henda søgan hevur víst seg at endurtaka seg.

Nú er prísurin aftur høgur, og íleggjarar hava áhuga í alivinnuni. Væntast kann tí, at alivinnan fer at vaksa. Peningastovnarnir hava boðað frá, at áhugin fyri at gera

íløgur í alifeløg er stórur. Tí verður roknað við, at alivinnan setir ferð á framleiðsluna næsta ár.

Útsetingin í ár er 4 mió. smolt, og mett verður, at útsetingin næsta ár verður 6 mió. smolt. Næsta ár verður tøkan 10.000 tons, í 2007 verður hon 15.000 tons og í 2008 verður hon mett til at fara at verða oman fyri 20.000 tons. Viðvíkjandi sílaframleiðsluni verður mett, at árliga framleiðslan fer at liggja um 3.000 til 4.000 tons næstu árini.

Vøksturin í privatu handils- og tænastuvinnunum seinastu árini er nú avhasaður. Fyrra hálvár í ár var afturgongd í eftirspurninginum eftir næstan øllum nýtsluvørum uttan matvørum og persónbilum. Fyrra hálvár í ár keyptu føroyingar millum 3 og 5% fleir matvørur enn somu tíð í fjør, men sølan av bíligum matvørum er vorðin ein lutfalsliga størri partur. Stór afturgongd hevur verið í søluni av klædnavørum og fótbúnaði. Kappingin í hesari vinnuni er nógv harnað, men handlarnir í Havnini vísa seg at klára seg betur í kappingini enn handlarnir á uttan fyri Havnina.

Sølan av nýggjum persónbilum var góð 15% hægri fyrra hálvár í ár samanborið við somu tíð í fjør, men sølan av vinnuakførum var meira enn 36% minni. Tí hevur samlaða sølan av bilum og øðrum flutningsførum verið á leið tann sama fyrra hálvár í ár sum somu tíð í fjør.

Nógv virksemi er í byggivinnuni. Nógv bygging hevur verið av almennum stovnum, serliga barnagørðum og eldrabýlum. Eftirspurningurin eftir virkisbygningum er harafturímóti ikki so stórur.

Stórur eftirspurningur er eftir húsum og íbúðum. Tað er serliga í Havnini, at eftirspurningurin og bíðilistarnir eftir húsum og íbúðum er stórur, og íbúðarprísirnir eru tí støðugt vaksandi. Størsta útstykkingin í Føroyum nakrantíð, Hoyvíkshagin Suður, var liðug í summar og fólk eru byrjað at byggja í hesi

útstykkingini. Sambært byggivinnuni eru tilsamans 400 til 500 íbúðir á tekniborðinum í løtuni.

## 4.3 Gongdin í privata húsarhaldinum

Metingar hjá Fíggjarmálaráðnum vísa, at realinntøkan hjá føroyskum húsarhaldum er vaksin seinastu árini, tí lønarvøkstur og skattalættar hava ávirkað nýtslumøguleikarnar meira enn vøksturin í brúkaraprístalinum. Henda gongdin fer neyvan at halda fram, tí eingi útlit eru fyri, at lønirnar fara at hækka, og oljuprísirnir eru vaksandi.

Føroysk húsarhald eru annars væl fyri. Rentan er lág, og húsaprísirnir eru nógv vaksnir, serliga í miðstaðarøkinum. Húsaprísirnir eru tó ikki so nógv vaksnir her sum í nógvum øðrum londum, har stórur íbúðareftirspurningur saman við nýggjum fíggingarhættum, t.d. avdráttarfríum lánum, hava ført til brávøkstur í húsaprísunum. Hetta hevur økt um nýtsluna hjá húsaeigarum, tí teir hava veðsett økta virðið í húsunum til aðra nýtslu. Serliga ungar familjur kunnu gerast taparar í hesi gongdini, tí tað gerst ómetaliga tungt fíggjarliga at seta føtur undir egið borð.

Slíkur brávøkstur hevur ikki verið í føroysku húsaprísunum, tí her er tað bert eftirspurningurin og ikki nýggir fíggingarhættir, sum draga sethúsaprísin uppeftir. Vaksandi sethúsaprísirnir hava tó gjørt tað truplari at seta føtur undir egið borð.

Sambært føroysku peningastovnunum eru føroyskir sethúsaeigarar annars væl fyri, og tí eru vaksandi oljuprísirnir ikki nøkur vanlukka fyri privatu húsarhaldini í Føroyum. Vaksandi oljuprísirnir hava við sær, at føroysku húsarhaldini mugu raðfesta øðrvísi, soleiðis at fleiri pengar verða settir av til olju og færri pengar verða til aðra nýtslu.

## 4.4 Gongdin í kommunala búskapinum

Skattainntøkurnar hjá kommununum eru í miðal vaksnar 3,5% um árið frá 2000 til 2004, sí talvu 4.5. Rentuútreiðslurnar eru samstundis nógv minkaðar, meðan

rakstrar- og løguútreiðslurnar eru nógv vaksnar. Rakstrar- og løguútreiðslurnar hjá kommununum vóru meira enn 400 mió. kr. hægri í 2004 enn í 2001, og svarar hetta til 12,1% í miðal árligum vøkstri. Samlaða búskaparliga virksemið í Føroyum hevur tí verið nógv stimbrað av kommununum seinastu árini.

**Talva 4.5: Gongdin í kommunala búskapinum, 2000-2004**

| *tús. kr.* | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** |
|---|---|---|---|---|---|
| Skattainntøkur | 971.600 | 1.025.253 | 1.084.977 | 1.099.375 | 1.115.343 |
| Rakstrarútreiðslur | 537.697 | 623.970 | 627.331 | 751.276 | 780.013 |
| Rentuútreiðslur | 74.386 | 52.569 | 35.981 | 23.977 | 16.143 |
| Íløgur | 170.057 | 141.802 | 228.207 | 235.955 | 336.600 |

Kelda: Innlendismálaráðið.

## 4.5 Gongdin í fólkatalinum

Stórur vøkstur var í fólkatilflytingini í Føroyum fram til 2001, tá ið vøksturin minkaði aftur, sí talvu 4.6. Burðaravlopið er høgt í Føroyum samanborið við grannalondini og nógv onnur lond í Evropa.

Um árslok 2004 var fólkatalið í Føroyum 48.379. Í 2004 fluttu fleiri fólk úr Føroyum enn til Føroyar. Burðaravlopið var harafturímóti hægri í 2004 enn árini frammanundan. Tað er tí ikki nettotilflytingin, men burðaravlopið, ið er orsøkin til at fólkatalið í Føroyum vaks við 165 persónum í 2004.

Í ár verður mett, at burðaravlopið og nettotilflytingin fara at viga nakað upp ímóti hvørjum øðrum, og at fólkatalið við árslok 2005 verður nakað tað sama ella eitt lítið vet minni enn í fjør.

**Talva 4.6: Gongdin í fólkatalinum, 2000-2004**

| | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 |
|---|---|---|---|---|---|
| Fødd | 698 | 631 | 708 | 704 | 715 |
| Deyð | 351 | 361 | 394 | 407 | 379 |
| **Burðaravlop** | **347** | **270** | **314** | **297** | **336** |
| Tilflyting | 1.819 | 1.768 | 1.739 | 1.550 | 1.412 |
| Fráflyting | 1.357 | 1.208 | 1.331 | 1.321 | 1.559 |
| **Nettotilflyting** | **462** | **560** | **408** | **229** | **-147** |
| Rættingar | -25 | -30 | -14 | -16 | -15 |
| Fólkavøkstur | 784 | 800 | 708 | 510 | 165 |
| **Fókatal 31. desember** | **46.196** | **46.996** | **47.704** | **48.214** | **48.379** |

Kelda: Hagstova Føroya

## 4.6 Gongdin í arbeiðsloysinum

Føroyska arbeiðsloysið er sera lágt samanborið við onnur lond. Arbeiðsloysið í norðanlondum er í miðal góð 5%, meðan tað í Føroyum hevur verið undir 4% síðan 2000, sí talvu 4.7.

**Talva 4.7: Gongdin í arbeiðsloysinum, 2000-2004**

| | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 |
|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skrásettum | 1.138 | 876 | 679 | 750 | 1.105 |
| Tal av fulltíðararbeiðsleysum | 1.008 | 770 | 596 | 664 | 961 |
| Arbeiðsfjøld | 23.832 | 25.058 | 25.939 | 26.617 | 27.128 |
| Arbeiðsleys í % av arbeiðsfjøld | 4,2 | 3,1 | 2,3 | 2,5 | 3,5 |
| Árstíðarjavnað arbeiðsloysis-% | 4,2 | 3,1 | 2,3 | 2,5 | 3,6 |

Kelda: Hagstova Føroya

Í februar í ár var talið á fulltíðararbeiðsleysum 1.215 svarandi til 4,5%, men arbeiðsloysið er síðan minkað aftur, og í juli var talið á fulltíðararbeiðsleysum 992 svarandi til 3,6%.

Arbeiðsloysið er eitt sindur ójavnt býtt landafrøðiliga. Fyrra hálvár í ár minkaði arbeiðsloysið í øllum landinum við 223 fólkum, men í Norðoyggjum vaks arbeiðsloysið við 21 fólkum. Norðoyggjar hava havt næstlægsta arbeiðsloysi, men hava nú næsthægsta. Arbeiðsloysið í Suðuroynni minkaði úr 9% niður í 7%, men er framvegis meira enn dupult so stórt sum aðrastaðni í landinum. Eysturoyggin hevur framvegis minsta arbeiðsloysið, sum liggur millum 2% og 3%.

## 4.7 Gongdin í brúkaraprístalinum

Annan ársfjórðing í ár var vøksturin í brúkaraprístalinum 1,7% samanborið við sama ársfjórðing í fjør, men tað er rættiliga ymiskt, hvussu gongdin hevur verið í teimum 12 høvuðsbólkunum í prístalsgrundarlagnum, sí talvu 4.8.

Prísirnir á samskifti, klædnavørum og fótbúnaði eru lækkaðir nógv síðan 2001. Sama tíðarskeið er tað vorðið væl dýrari at fara á matstovu og gistingarhús. Heilsuútreiðslurnar eru eisini nógv vaksnar, og her eru tað serliga útreiðslurnar til heilivág og tannlækna, sum eru hækkaðar.

**Talva 4.8: Gongdin í brúkaraprístalinum, 2001-2005**

| *2. ársfjórðingur* | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** |
|---|---|---|---|---|---|
| Brúkaraprístalið | 100,5 | 100,5 | 102,0 | 102,2 | 103,9 |
| -Matur og drekka | 101,3 | 103,4 | 103,5 | 104,0 | 104,8 |
| -Rúsdrekka og tubbak | 100,0 | 100,2 | 101,0 | 101,6 | 110,4 |
| -Klædnavørur og fótbúnaður | 99,9 | 101,4 | 99,9 | 98,0 | 92,5 |
| -Býli | 100,8 | 93,8 | 95,1 | 93,9 | 98,0 |
| -Húsbúnaður, húsarhaldstól o.l. | 100,6 | 102,3 | 102,4 | 102,2 | 101,2 |
| -Heilsa | 100,0 | 102,4 | 108,4 | 112,0 | 112,9 |
| -Flutningur | 99,7 | 99,9 | 105,4 | 107,6 | 110,8 |
| -Samskifti | 94,8 | 92,8 | 91,0 | 87,1 | 87,6 |
| -Frítíð og mentan | 102,0 | 105,7 | 107,9 | 107,5 | 107,1 |
| -Útbúgving | 100,0 | 104,1 | 100,3 | 94,8 | 101,2 |
| -Hotel og matveitarar | 102,6 | 106,4 | 108,1 | 111,5 | 113,0 |
| -Ymiskar vørur og tænastur | 100,4 | 103,7 | 105,5 | 107,2 | 108,7 |

Kelda: Hagstova Føroya

Síðan annan ársfjórðing í fjør hevur prísvøksturin í nýtslubólkinum býli verið 4,1% og í bólkinum flutningur 3%. Í báðum nýtslubólkunum er tað vaksandi oljuprísurin, sum er høvuðsorsøkin. Brennioljan til húsarhald er hækkað 24,4% og brennievni til flutning er hækkað 8,3%. Herumframt eru tað serliga hægri avgjøld á tubbaksvørur og onnur heilsuavgjøld, sum hava ávirkað prístalið upp eftir seinasta hálvárið.

Prísvøksturin er harafturímóti tálmaður av, at prísirnir á klædnavørum og fótbúnaði eru lækkaðir, samstundis sum avgjaldslækkingar á sjónvarpstólum, útvarpstólum og øðrum elektroniskum útbúnaði hava drigið samlaða prísvøksturin niður eftir seinasta hálvárið.

Tað er vert at leggja til merkis, at útreiðslurnar til býli framvegis eru lægri enn tær vóru í 2001, hóast oljuprísurin seinastu 12 mánaðirnar hevur verið væl hægri enn hann var í 2001, sí mynd 4.2. Frágreiðingin er m.a., at rentan er nógv lækkað, men henda gongdin gevur eisini eina ábending um, at relativi prísurin á olju er lægri nú, enn hann var fyrr.

**Mynd 4.2: Listaprísurin á gassolju í Føroyum, 2000-2005**




Kelda: Statoil Føroyar.
Viðm: Listaprísurin er prísurin, áðrenn avgjøld eru roknað.

## 4.8 Gongdin í fíggjarliga sektorinum

Føroysku peningastovnarnir eru væl fyri. Samanlagt hava teir havt stór avlop seinastu árini, 2003 tó undantikið, tá ið Føroya Sparikassi setti nógv av ímóti tapi í alivinnuni og tí hevði hall á sínum ársroknskapi, sí talvu 4.9.

**Talva 4.9: Samlað úrslit hjá føroysku peningastovnunum, 2001-2004**

| *Mió. kr.* | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** |
|---|---|---|---|---|
| Inntøkur av rentum og ómaksgjøldum | 540 | 546 | 574 | 553 |
| Kursbroytingar | 19 | 45 | 16 | 86 |
| Úrslit av fíggjarligum postum | 575 | 613 | 616 | 648 |
| Rakstrarútreiðslur | 271 | 302 | 292 | 294 |
| Tap og burturleggingar, netto | -6 | 23 | 425 | 102 |
| Úrslit áðrenn skatt | 310 | 288 | -100 | 252 |
| Solvensprosent | 32,0 | 32,0 | 30,9 | 31,4 |

Kelda: Roknskapirnir hjá føroysku peningastovnunum.

Verður alivinnan undantikin, hava peningastovnarnir ikki sett so nógv av ímóti tapi av øðrum lánum. Hetta kann vera ein ábending um, at vinnan hevur brúkt góðu tíðirnar til at konsolidera seg. Føroysku peningastovnarnir eru annars væl konsolideraðir. Solvensprosentið var omanfyri 31% í 2004. Hetta er nógv hægri enn tey lógarkravdu 8%. Peningastovnarnir meta, at úrslitini í ár verða minst líka góð sum í 2004.

## 4.9 Gongdin á handilsjavna og uttanlandsskuld

Hallið á føroyska handilsjavnanum var umleið 70 mió. kr. í 2004. Hetta er væl minni enn í 2003, tá ið hallið var næstan 1 mia. kr., sí mynd 4.3 og talvu 4.10. Orsøkin til stóra hallið í 2003 var, at nýggja Norrøna varð kom hetta árið. Verða skip og aðrar stórar íløguvørur tiknar burturúr, so var avlop á 63 mió. kr. á handilsjavnanum í 2003.

## Mynd 4.3: Føroyski handilsjavnin, 1988-2004




Kelda: Hagstova Føroya.

Tá ið skipini og aðrar stórar íløguvørur eru tiknar burturúr, er fallandi virðið á fiskaútflutninginum orsøkin til, at útflutningurin er minkaður seinastu árini.[4] Tað er serliga útflutningurin av toski, rækjum og alifiski, sum er nógv minkaður.

Útflutningurin av rækjum er minkaður burtur í nærum einki. Útflutningsvirðið á rækjum minkaði 60% frá 2001 til 2004 og helvtin av minkingini var í 2004.

Alifiskur var framvegis ein lutfalsliga stórur partur av útflutninginum í 2004. Í 2003 var 26% av útflutninginum aldur fiskur og í 2004 var 22% aldur fiskur. Í ár og næsta ár fer útflutningurin av aldum fiski at minka munandi. Tað skal viðmerkjast, at vaksandi útflutningsprísir seinastu mánaðirnar hava bøtt nakað um útflutningsvirðið. Útflutningsprísirnir hava verið minkandi seinastu árini, men eru nú vaksandi aftur.

Fyrra hálvár í ár hevur útflutningurin verið 11% minni enn somu tíð í fjør. Útflutningurin av fiski var 189 mió. kr. minni, og av hesum er útflutningurin av toski minkaður heilar 156 mió. kr. Útflutningurin av upsa var 78 mió. kr. størri fyrr hálvár í ár, men hetta munar lítið, tí nærum allur annar útflutningur minkaði.

[4] Tað skal í hesum sambandi viðmerkjast, at skráetingin av føroyskum útflutningi enn ikki er nøktandi. Tað er næstan bert fiskaútflutningurin, ið verður skrásettur nøktandi.

Fiskaútflutningurin er minkaður 37% í nøgd, men 10% í virði fyrra hálvár í ár samanborið við somu tíð í fjør. Hetta vísir, at flestu útflutningsprísirnir eru vaksandi, prísirnir á vørum úr upsa eru tó undantiknir.

Innflutningurin minkaði eisini í 2004, men ikki eins nógv sum útflutningurin. Tað var serliga innflutningurin av íløguvørum og rávørum til framleiðsluvinnuna, sum minkaði. Innflutningurin til beinleiðis nýtslu og innflutningurin til byggivinnuna var á leið tann sami í 2004 sum í 2003. Vaksandi oljuprísirnir øktu munandi um innflutningin av olju í 2004. Fer oljuprísurin at halda sær á sama høga støði í 2006 sum nú, so fer árligi innflutningurin av brennievni at vaksa til meira enn 700 mió. kr. ímóti 450 mió. kr. í 2003.

Fyrra hálvár í ár minkaði innflutningurin 6% ella 116 mió. kr. í virði samanborið við somu tíð í fjør. Innflutningurin er minkaður í flestu vørubólkum uttan brennievni. Innflutningurin av brennievni var 369 mió. kr. fyrra hálvár í ár samanborið við 249 mió. kr. somu tíð í fjør. Hesin vøksturin svarar til 120 mió. kr. ella 48%.

Størsta minkingin er í innflutninginum av vørum til vinnuliga nýtslu, sum minkaði 18% og í innflutninginum av maskinum og vinnuakførum, sum minkaði 23%. Innflutningurin av persónvognum og innflutningurin til beinleiðis nýtslu er eitt lítið vet hægri enn fyrra hálvár í fjør.

**Talva 4.10: Út- og innflutningur skiftur á høvuðsbólkar, 2000-2004**

| *Mió. kr.* | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** |
|---|---|---|---|---|---|
| **Útflutningur:** | | | | | |
| -Køldur fiskur | 1.142 | 1.404 | 1.477 | 1.288 | 1.185 |
| -Frystur fiskur | 1.486 | 1.609 | 1.581 | 1.368 | 1.173 |
| -Saltaður fiskur | 544 | 678 | 653 | 642 | 543 |
| -Royktur fiskur | 47 | 67 | 29 | 14 | 29 |
| -Turkaður fiskur | 156 | 222 | 220 | 238 | 364 |
| -Tilgjørdur niðursjóðaður fiskur | 94 | 125 | 127 | 109 | 83 |
| -Fiskur, onnur haldbúning | 57 | 74 | 74 | 104 | 81 |
| -Aðrar fiskavørur | 8 | 15 | 1 | 0 | 1 |
| -Skip | 258 | 58 | 61 | 139 | 189 |
| -Aðrar vørur | 40 | 28 | 12 | 9 | 22 |
| **Útflutningur tilsamans** | **3.832** | **4.281** | **4.235** | **3.912** | **3.668** |
| **Innflutningur:** | | | | | |
| -Til hav- og landbúnað | 299 | 368 | 276 | 297 | 220 |
| -Til byggivirki | 292 | 343 | 383 | 357 | 366 |
| -Til aðra framleiðslu | 688 | 734 | 746 | 756 | 687 |
| -Brennievni o.t. | 509 | 489 | 415 | 446 | 531 |
| -Maskinur og onnur útgerð | 438 | 622 | 441 | 475 | 367 |
| -Bilar og onnur flutningsfør | 210 | 250 | 260 | 229 | 208 |
| -Til beinleiðis nýtslu | 942 | 1.012 | 1.093 | 1.067 | 1.083 |
| -Skip, flogfør og tílíkt | 794 | 223 | 178 | 1.154 | 179 |
| -Rávøra til fiskavirking | 137 | 117 | 103 | 85 | 96 |
| **Innflutningur tilsamans** | **4.308** | **4.158** | **3.896** | **4.864** | **3.738** |
| **Handilsjavni** | **-476** | **123** | **339** | **-952** | **-70** |

Kelda: Hagstova Føroya.

Í 2003 og 2004 áttu føroyingar uml. 3 mia. kr. í nettoáogn uttanlands. Hetta verður mett at svara til uml. 30% av BTÚ. Í 2002 var nettoáognin 4,4 mia. kr. Bruttoskuldin uttanlands er lítið økt seinastu árini. Í 2002 var skuldin uttanlands 5,8 mia. kr. og í 2003 og í 2004 hevur hon verið 6 mia. kr. Bruttoognin uttanlands er harafturímóti minkað 1,2 mia. kr. frá 2002 til 2004. Í 2002 var bruttoognin 10,2 mia. kr., í 2003 var hon 9,4 mia. kr. og í 2004 var hon 9 mia. kr.

## 4.10 Framtíðarútlitini fyri føroyska búskapin

Tað eru ikki útlit fyri nøkrum sjónligum bata í føroyska búskapinum komandi árið. Høgir og vaksandi oljuprísir eru ein hóttan fyri fiskivinnuna og fiskivinnan á

landi verður helst noydd at fremja rationaliseringar í kappingini við láglønarlond. Fiskaprísirnir eru vaksandi, men vinningurin av hesum verður etin upp av vaksandi oljuprísunum. Í alivinnuni verður framleiðslan lítil næsta ár, men síðan fer hon at vaksa.

Privatu húsarhaldini fara eisini at merkja vaksandi oljuprísirnar, men talan verður tó ikki um nakra kreppu. Vaksandi oljuprísir fara at gera tað neyðugt hjá privatum húsarhaldum at raðfest øðrvísi, soleiðis at útreiðslur til aðrar nýtsluvørur verða raðfestar lægri. Privatu húsarhaldini eru væl fyri at taka ímóti hesi avbjóðing, tí privata nýtslan er nógv vaksin seinastu árini, samstundis sum rentan er lækkað og útlit eru ikki fyri nakrari rentuhækking í bræði.

Oljutrot og vaksandi oljuprísir kunnu eisini fáa gagnliga ávirkan á føroyska búskapin, tí hetta økir um áhugan hjá oljufeløgum at bora eftir olju við Føroyar. Í sambandi við 2. útbjóðingarumfar vórðu loyvi latin til 7 oljusamtøk at royndar-bora eftir olju við Føroyar. Loyvini eru galdandi frá 3 til 8 ár, men oljusamtøkini avgera sjálvi, um tey fara at royndarbora ella ikki. Hetta er øðrvísi enn í 1. útbjóðingarumfari, tá ið oljusamtøkini bundu seg at gera royndarboringar.

Tað eru sostatt glottar fyri framman, um hugt verður longur fram í tíðina. Landsstýrið hevur eisini sett sær tað stevnumið, at Føroyar skulu vera millum fremstu lond í heiminum í 2015.

# 5. FÍGGJARLÓGARUPPSKOTIÐ 2006

## 5.1 Búskaparpolitikkurin 2006

Í fíggjarlógaruppskotinum 2006 er dentur lagdur á, at fíggjarlógin ikki skal virka tálmandi á føroyska búskapin, nú stígur í nøkur ár hevur verið í búskaparliga virkseminum á fleiri økjum í føroyska samfelagnum. Samstundis verður ansað eftir, at hetta økir ikki um útreiðslur landskassans.

Landsstýrið hevur tí valt at gera eitt fíggjarlógaruppskot, sum ikki órógvar føroyska samfelagið alt ov nógv í 2006. Viðbreknu oljuprísirnir eru ein nóg stór hóttan ímóti føroyska búskapinum. Landsstýrið metir ikki, at landið skal leggja stein oman á byrði við at tálma búskaparliga virkseminum í 2006. Hetta er ein av høvuðsorsøkunum til, at tað verður búsketterað við fíggjarlógarhalli í 2006.

## 5.2 Úrslitið á fíggjarlógaruppskotinum 2006

RLÚ-hallið hjá landskassanum verður 219 mió. kr. í 2006. Hetta er væl minni enn hallið í 2005, sum verður mett til 270 mió. kr., sí mynd 5.1.

**Mynd 5.1: RLÚ-úrslit landskassans, 2000-2006**




Viðm: Tølini fyri 2005 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2006 eru úr fíggjarlógaruppskotinum.

Talva 5.1 vísír vøksturin í inntøkum og útreiðslum landskassans frá 2001 til 2006.

**Talva 5.1: Vøkstur í inntøkum og útreiðslum landskassans, 2001-2006**

| *Vøkstur í %* | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Inntøkur | 8,9 | -5,2 | -0,9 | -2,7 | 0,1 | -1,6 |
| Útreiðslur | 7,4 | 10,0 | 3,9 | 2,2 | 3,3 | -2,8 |

## 5.3 Gongdin í inntøkum landskassans

Inntøkur landskassans verða bólkaðar í 4 høvuðsbólkar, sí talvu 5.2. Samlaðu inntøkur landskassans vuksu nógv fram til 2001, tá ið tær vóru mestar. Síðan tá eru inntøkur landskassans minkaðar. Størsta minkingin var í 2002, tá ið heildarveitingin varð skerd 366 mió. kr. Mett verður, at tað verður ikki so stórt sveiggj í inntøkum landskassans í 2004, 2005 og 2006, sum árini frammanundan.

Størsti parturin av inntøkum landskassans eru skattainntøkur. Skattainntøkurnar vuksu á hvørjum ári til 2002 og eru síðan minkaðar. Hetta kemst í høvuðsheitinum av, at skattalættar vórðu givnir fyri 52 mió. kr. í 2003, 71 mió. kr. í 2004 og 60 mió. kr. í ár. Í 2006 verður landsskatturin minkaður afturfyri, at kommunurnar og arbeiðsmarknaðurin taka yvir barnaverndarøkið og barsilsskipanina.

Næst størsti parturin av inntøkum landskassans eru avgjaldsinntøkur. Avgjaldsinntøkurnar vuksu nógv fram til 2003, tá ið tær vóru mestar. Síðan 2003 hava avgjaldsinntøkurnar verið rættiliga støðugar. Nakrar lógarbroytingar vórðu gjørdar á avgjaldsøkinum í 2005. Punktgjøldini vórðu strikaði á útvarpstólum, sjónvarpstólum og øðrum elektriskum útbúnaði, samstundis sum nýggj punktgjøld vórðu løgd á tubbakk og aðrar ikki heilsugóðar vørur.

Undir ymsum inntøkum eru m.a. ymisk loyvisgjøld til landskassan, bøtur og útluting úr partafeløgum, sum landið eigur ella eigur í. Høvuðsorsøkin, til at ymsar inntøkur minkaðu nógv í 2004, er vánaliga úrslitið hjá Føroya Banka í 2003. Úrslitið var betur í 2004 og verður væntandi minst líka gott í 2005. Tí verða inntøkurnar eisini hægri í 2005 og 2006.

**Talva 5.2: Inntøkur landskassans, 2000-2006**

| *Mió. kr.* | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skattainntøkur | 1.310 | 1.567 | 1.675 | 1.581 | 1.539 | 1.494 | 1.393 |
| Avgjaldsinntøkur | 1.117 | 1.148 | 1.239 | 1.274 | 1.259 | 1.281 | 1.307 |
| Ymsar inntøkur | 89 | 90 | 58 | 81 | 41 | 70 | 90 |
| Heildarveiting o.t. | 973 | 995 | 629 | 632 | 633 | 630 | 631 |
| **Tilsamans** | **3.489** | **3.800** | **3.601** | **3.568** | **3.472** | **3.475** | **3.421** |

Viðm: Tølini fyri 2005 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2006 eru úr fíggjarlógaruppskotinum.

## 5.4 Gongdin í útreiðslum landskassans

Stórur vøkstur var í útreiðslum landskassans fram til 2002. Síðan tá hevur vøksturin verið minni, og í 2006 fara útreiðslurnar at minka, sí talvu 5.3. Nógv tann størsti parturin av útreiðslum landskassans eru rakstrarútreiðslur. Rentuútreiðslurnar fylla nú lítið á útreiðslusíðu landskassans. Í 1995 vóru rentuútreiðlsur landskassans næstan 500 mió. kr. ella meira enn 10 ferðir so stórar sum nú.

Í rakstrarútreiðslunum eru lønir og ymiskar flytingar til einstaklingar, t.d. fólkapensjón, nógv tann størsti parturin. Lønirnar umboða umleið tveir triðingar av rakstrarútreiðslunum, og tí hevur gongdin í lønarútreiðslunum alstóran týdning fyri gongdina í rakstrarútreiðslunum.

Tann stóri lønarvøksturin, ið hevur verið seinastu árini, kann ikki halda fram, og tí verða eingir pengar settir av til lønarvøkstur í sambandi við sáttmálasamráðingarnar í heyst. Hetta er avgerandi neyðugt fyri, at javnvág skal fáast aftur á fíggjarlógina.

**Talva 5.3: Útreiðslur landskassans, 2000-2006**

| *Mió. kr. (netto)* | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 2.586 | 2.846 | 3.147 | 3.192 | 3.324 | 3.486 | 3.422 |
| Løguútreiðslur | 174 | 180 | 240 | 262 | 228 | 211 | 185 |
| Rentuútreiðslur | 126 | 76 | 24 | 91 | 72 | 48 | 33 |
| **Tilsamans** | **2.886** | **3.102** | **3.411** | **3.545** | **3.624** | **3.745** | **3.640** |

Viðm: Tølini fyri 2005 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2006 eru úr fíggjarlógaruppskotinum.

Tað skal viðmerkjast, at ein av orsøkunum til at útreiðslur landskassans verða minni á fíggjarlógaruppskotinum 2006 er, at barsilsskipanin, barnaverndin, apoteksverkið og hovstunnilin verða løgd út um fíggjarlógina í 2006.

Talva 5.4 vísir nettorakstrarútreiðslur landskassans býttar á greinar frá 2002 til 2006. Tølini skulu takast við fyrivarni, tí í 2002 og 2003 eru tað tølini fyri løgmál (í 2002 innlendismál) og oljumál, sum eru løgd saman til innlendismál. Í 2003 eru tølini fyri familju- og heilsumál og almannamál løgd saman til almanna- og heilsumál. Talva 5.5 vísir løgurnar frá 2002 til 2006 býttar á málsøki.

**Talva 5.4: Nettorakstrarútreiðslur landskassans, 2002-2006**

| *Mió. kr.* | | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| § 1 | Løgtingið | 31,0 | 31,0 | 33,5 | 36,7 | 36,9 |
| § 2 | Løgmansfyrisitingin | 39,6 | 28,9 | 31,8 | 36,6 | 32,8 |
| § 3 | Fíggjarmál | 218,6 | 198,5 | 199,8 | 208,4 | 215,7 |
| § 5 | Fiskivinna | 146,7 | 149,7 | 165,3 | 177,0 | 169,1 |
| § 6 | Vinnumál | 376,1 | 345,8 | 284,5 | 301,8 | 207,9 |
| § 7 | Útbúgving og gransking | 633,4 | 665,0 | 691,3 | 725,1 | 735,2 |
| § 8 | Almanna- og heilsumál | 1.663,8 | 1.728,9 | 1.809,0 | 1905,1 | 1.906,9 |
| § 15 | Innlendismál | 37,4 | 44,3 | 108,7 | 95,1 | 118,0 |
| **Tilsamans** | | **3.146,6** | **3.192,1** | **3.323,9** | **3.485,8** | **3.422,5** |

Viðm: Tølini fyri 2005 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2006 eru úr fíggjarlógaruppskotinum.

**Talva 5.5: Løguútreiðslur landskassans, 2002-2006**

| *Mió. kr.* | | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| § 1 | Løgtingið | 22,5 | 11,6 | 0,8 | 10,0 | 20,0 |
| § 2 | Løgmansfyrisitingin | 2,4 | 2,1 | 2,5 | 2,5 | 5,0 |
| § 3 | Fíggjarmál | 0,6 | -0,1 | 1,5 | -1,0 | 0,0 |
| § 5 | Fiskivinna | 1,9 | 0,4 | 0,0 | 1,0 | 10,1 |
| § 6 | Vinnumál | 146,5 | 166,3 | 89,0 | 56,7 | 68,3 |
| § 7 | Útbúgving og gransking | 7,8 | 14,0 | 6,7 | 41,5 | 48,7 |
| § 8 | Almanna- og heilsumál | 58,6 | 67,7 | 61,5 | 68,0 | 32,4 |
| § 15 | Innlendismál | - | - | 66,0 | 32,3 | 0,0 |
| **Tilsamans** | | **240,3** | **261,9** | **228,1** | **211,0** | **184,5** |

Viðm: Tølini fyri 2005 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2006 eru úr fíggjarlógaruppskotinum.

## 5.5 Raðfestingar hjá einstøku landsstýrismonnunum í 2006

Í talvu 5.6 er stutt yvirlit yvir, hvussu gongdin er í ymsu játtanarsløgunum frá fíggjarlógini 2005 til fíggjarlógaruppskotið 2006 og hvussu broytingarnar eru býttar millum ymsu landsstýrismenninar. Nágreiniligar viðmerkingar og grundgevingar fyri broytingunum eru í viðmerkingunum til einstøku konturnar í fíggjarlógaruppskotinum.

Í fíggjarlógaruppskotinum 2006 økjast rakstrarútreiðslurnar 99,2 mió. kr. Lógarbundnu útreiðslurnar minka 90,8 mió. kr. Løguútreiðslurnar vaksa 4,7 mió. kr. Játtanin til landsfyritøkur veksur 24,9 mió. kr. og onnur játtan minkar 47,1 mió. kr., harav minka útreiðslurnar 26,6 mió. kr. og inntøkurnar vaksa 20,5 mió. kr.

**Talva 5.6: Broytingar frá fíggjarlógini 2005 til fíggjarlógaruppskotið 2006**

| § | FL-2005 | Rakstur | Lóg | Løga | Landsf. | Onnur | FLU-2006 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 46.710 | 252 | -78 | 10.000 | - | - | 56.884 |
| 2 | 34.817 | 490 | - | 2.500 | - | 10 | 37.817 |
| 3 | 204.164 | 9.966 | 2.350 | 1.000 | - | -1.800 | 215.680 |
| 5 | 164.220 | 7.870 | -500 | 9.100 | - | -1.470 | 179.220 |
| 6 | 344.934 | 10.147 | -68.400 | 15.700 | -1.200 | -24.950 | 276.231 |
| 7 | 763.109 | 11.127 | 8.936 | 1.700 | - | -927 | 783.945 |
| 8 | 1.916.564 | 58.638 | -33.155 | -5.600 | - | 2.813 | 1.939.260 |
| 15 | 121.159 | 720 | - | -29.750 | 26.107 | -242 | 117.994 |
| 20 | -3.367.269 | - | - | - | - | -20.549 | -3.387.818 |
| | **228.408** | **99.210** | **-90.847** | **4.650** | **24.907** | **-47.115** | **219.213** |

Niðanfyri eru vístar nakrar broytingar í rakstrinum, sum landsstýrismenninir halda hava serligan týdning. Løgurnar eru nærri lýstar í parti 5.6.

**§ 1 Løgtingið:**

Í fíggjarlógaruppskotinum verða rakstrarútreiðslurnar til løgtingsarbeiðið og landsgrannskoðanina øktar 252 tús. kr. Eftirlønin og bíðilønin til løgtinsmenn lækkar 78 tús. kr. og løgujáttanin til løgtingshúsið hækkar 10 mió. kr.

**§ 2 Løgmansfyrisitingin:**

Í fíggjarlógaruppskotinum 2006 verða rakstrarútreiðslurnar hjá løgmansfyrisitingini og sendistovum øktar 490 tús. kr. Løgujáttanin til umbygging í Tinganesi verður økt 2,5 mió. kr.

**§ 3 Fíggjarmál:**

Karmurin hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum verður øktur 10,5 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2006 samanborið við fíggjarlógarlógina 2005.

| | | |
|---|---|---|
| -Landsins ognir | + | 1,2 mió. kr. |
| -Søla av Elektron | - | 5,0 mió. kr. |
| -Landsbankin | + | 5,0 mió. kr. |
| -Hagstova Føroya | + | 3,5 mió. kr. |
| -Tænastumannaeftirlønir | + | 1,0 mió. kr. |
| -FAS | + | 3,2 mió. kr. |

**§ 5 Fiskivinna:**

Karmurin hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum verður øktur 5,9 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2006 samanborið við fíggjarlógarlógina 2005.

| | | |
|---|---|---|
| -Tilbúgving | + | 2,8 mió. kr. |
| -Fiskiveiðieftirlit | + | 2,2 mió. kr. |
| -Inntøkutrygd | - | 4,0 mió. kr. |
| -Sjúkratrygd | + | 1,5 mió. kr. |
| -Rækjustuðul | + | 3,5 mió. kr. |
| -Flutningsstuðul | - | 1,0 mió. kr. |

## § 6 Vinnumál:

Karmurin hjá landsstýrismanninum í vinnumálum verður minkaður 84,4 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2006 samanborið við fíggjarlógarlógina 2005.

| | | |
|---|---|---|
| -Landbúnaðarstuðul | - | 2,6 mió. kr. |
| -Havbúnaðarroyndir | - | 1,5 mió. kr. |
| -Fiskasjúkutænastur, ILA-verkætlan | + | 5,4 mió. kr. |
| -Vinnuframagrunnurin | - | 1,7 mió. kr. |
| -Endurgjald til skipasmíð | - | 2,1 mió. kr. |
| -Rúsdrekkasøla Landsins | - | 1,2 mió. kr. |
| -P/F Flogsamband, inntøka fellur burtur | + | 3,6 mió. kr. |
| -P/F Vágatunnilin, gjald fellur burtur | - | 20,0 mió. kr. |
| -KT-fyrisiting | + | 2,60 mió. kr. |
| -Ferðaráðið | + | 1,4 mió. kr. |
| -Barsilsskipanin | - | 71,7 mió. kr. |
| -Eftirlønir, Postverkið | + | 1,0 mió. kr. |
| -Infrakervið á útoyggjum | - | 1,0 mió. kr. |
| -Heilsufrøðiliga Starvstovan | + | 1,0 mió. kr. |

## § 7 Útbúgving og gransking:

Karmurin hjá landsstýrismanninum í útbúgvingar- og granskingarmálum verður øktur 19,1 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2006 samanborið við fíggjarlógar-lógina 2005.

| | | |
|---|---|---|
| -Fólkaskúlin | + | 4,1 mió. kr. |
| -Stuðul til fólkaskúlar, skúlabarnaflutningur | - | 1,2 mió. kr. |
| -Miðnámsskúlin | + | 7,0 mió. kr. |
| -Studningur til lærupláss | - | 2,3 mió. kr. |
| -Klaksvíkar Sjómansskúli | + | 1,2 mió. kr. |
| -Lestrarstuðul | + | 10,3 mió. kr. |
| -Bókasøvn | - | 1,7 mió. kr. |
| -Felagsútreiðlsur | + | 1,0 mió. kr. |
| -Læraraeftirlønir | + | 1,0 mió. kr. |
| -Almanna- og heilsuskúlin | - | 1,0 mió. kr. |

## § 8 Almanna-og heilsumál:

Karmurin hjá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum verður øktur 28,3 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2006 samanborið við fíggjarlógarlógina 2005.

| | | |
|---|---|---|
| -Landssjúkrahúsið | + | 6,8 mió. kr. |
| -Almanna- og heilsumálaráðið | + | 1,9 mió. kr. |
| -Viðlíkahald | + | 1,5 mió. kr. |
| -Talgild heilsuskipan | - | 4,0 mió. kr. |
| -Heilsuátøk | + | 2,5 mió. kr. |
| -Serviðgerð uttanlands | + | 11,5 mió. kr. |
| -Almannastovan | + | 2,0 mió. kr. |
| -Barnavernd til kommunurnar | - | 28,2 mió. kr. |
| -Stuðul til uppihaldspening | - | 1,3 mió. kr. |
| -Børn og ung | - | 2,8 mió. kr. |
| -Serforsorg | + | 4,2 mió. kr. |
| -Eldrarøkt | + | 18,0 mió. kr. |
| -Stuðlaskipanin | + | 16,8 mió. kr. |
| -Dagstovnur fyri serlig børn | + | 1,4 mió. kr. |
| -Vanlig forsorg | - | 10,0 mió. kr. |
| -Fólkapensjón | + | 5,7 mió. kr. |
| -Fyritíðarpensjón | - | 2,7 mió. kr. |
| -Eftirlønir innan heilsuverkið | + | 1,0 mió. kr. |

**§ 15 Innlendismál:**

Karmurin hjá landsstýrismanninum í innlendismálum verður øktur 26,6 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2006 samanborið við fíggjarlógarlógina 2005.

| | | |
|---|---|---|
| -Innlendismáláráðið | - | 2,0 mió. kr. |
| -Strandferðslan | + | 26,1 mió. kr. |
| -Tyrlutænastan | + | 1,6 mió. kr. |
| -Føroya Kærustovnur | + | 1,0 mió. kr. |

**§ 20 Inntøkur:**

Í fíggjarlógaruppskotinum 2006 vaksa inntøkur landskassans 20,5 mió. kr. samanbornar við fíggjarlógina 2005.

| | | |
|---|---|---|
| -Hægri vinningsbýti (metingar) | - | 10,0 mió. kr. |
| -Lætti í landsskattinum | + | 60,0 mió. kr. |
| -Rentusparing við at umleggja lán | - | 25,0 mió. kr. |
| -Vegskattur | - | 25,0 mió. kr. |
| -Punktgjøld | - | 10,0 mió. kr. |
| -Barsilskipan | + | 30,5 mió. kr. |
| -Rentuinntøkur | - | 10,8 mió. kr. |
| -Útgoldið úr Danska Tjóðbankanum | + | 3,0 mió. kr. |
| -Kolvetnisskattur, pesónar og feløg | - | 2,0 mió. kr. |
| -Kapitalvinningsskattur | - | 10,0 mió. kr. |

| | | |
|---|---|---|
| -Avgjald av kapitaleftirlønum | - | 1,0 mió. kr. |
| -Meirvirðisgjald | - | 10,0 mió. kr. |
| -Brennioljugjald | - | 2,0 mió. kr. |
| -Framleiðsluavgjøld | + | 2,00 mió. kr. |
| -Skrásetingargjald | - | 17,0 mió. kr. |
| -Útluting úr Fíggingargrunninum | - | 10,0 mió. kr. |
| -Aðrar inntøkur | - | 5,3 mió. kr. |
| -Endurgjald av keyps-MVG | - | 5,0 mió. kr. |

## 5.6 Løgur 2006

Í 2006 verða gjørdar løgur fyri næstan 230 mió. kr., sí mynd 5.7. Løgu-útreiðslurnar verða nakað minni, tí ætlanin er at selja løgur fyri 35 mió. kr. Í 2006 fara næstan allar 230 mió. kr. í løgum at skapa virksemið í Føroyum, nakað av útgerð verður sjálvandi keypt uttanlands, men ongar stórar løguverkætlanir verða gjørdar uttanlands í 2006.

Næstan 64 mió. kr. ella umleið 30% av løgunum fara til vega- og samferðslunetið kring landið, umleið 52 mió. kr. ella 23% fara til útbúgvingarøkið og næstan 41 mió. kr. ella 18% fara til almanna- og heilsuøkið.

Roynt verður eisini at spjaða løgurnar soleiðis landafrøðiliga, at tær eru mest virksemisskapandi, har arbeiðsloysið er størst. Umleið 41 mió. kr. av løgunum eru t.d. beinleiðis virksemisskapandi í Suðuroynni. Hetta er ein lutfalsliga stórur partur, men arbeiðsloysið í Suðuroynni er størri enn í restini av landinum.

**Talva 5.7: Løguætlanin fyri 2006** (1.000 kr.)

| | | |
|---|---|---|
| **§ 1** | **Løgtingið** | **20.000** |
| | Løgtingshús | 20.000 |
| **§ 2** | **Løgmansfyrisitingin o.a.** | **5.000** |
| | Umbygging í Tinganesi | 5.000 |
| **§ 5** | **Fiskivinna** | **12.100** |
| | Útgerð til Tórshavn Radio | 12.100 |
| **§ 6** | **Vinnumál** | **78.300** |
| | Umbygging av Heilsufrøðiligu starvstovuni | 10.500 |
| | Granskingarlund | 2.000 |
| | Tyrlupallur á Kirkju | 2.000 |
| | Øravík-Hov | 20.000 |
| | Bøur-Gásadalur | 2.000 |
| | Skálabotnur-Strendur | 9.000 |
| | Vegagerð í Kalsoy | 2.000 |
| | Klaksvík-Norðoyri | 500 |
| | Trygging av Norðskálatunnlinum | 6.000 |
| | Svínoy | 500 |
| | Fossá í Haldórsvík | 300 |
| | Innkoyringarvegur til Tórshavn | 6.000 |
| | Oyri-Norðskáli | 4.000 |
| | Trygdartiltøk, større ábøtur og at taka til | 4.000 |
| | Kanning av tunnli til Viðareiðis | 500 |
| | Norðoyartunnilsvegurin í Klaksvík | 2.000 |
| | Brúgvin við Streymin | 3.000 |
| | Kanning av undirsjóartunnli undir Skopunarfjørð | 4.000 |
| **§ 7** | **Útbúgving og gransking** | **48.700** |
| | Miðnámsskúlin í Suðuroynni | 18.000 |
| | Fiskivinnuskúlin í Vestmanna | 8.000 |
| | Skúladepilin við Marknagilsvegin | 4.000 |
| | Studentaskúlin í Hoydølum | 2.000 |
| | Læraraskúlin | 1.000 |
| | Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya | 1.500 |
| | Tekniski skúlin í Klaksvík | 5.000 |
| | Klaksvíkar Sjómansskúli | 1.200 |
| | Nýggj tøkni til útvarpið og sjónvarpið | 5.000 |
| | Kirkjubømúrurin | 1.000 |
| | Bókasøvn | 1.000 |
| | Mentamálaráðið | 500 |
| | Savnshús | 500 |
| **§ 8** | **Almanna- og heilsumál** | **62.400** |
| | Út- og umbygging av Landssjúkrahúsinum | 33.000 |
| | Eldrasambýli/bústaðir | 15.000 |
| | Klaksvíkar Sjúkrahús | 2.000 |
| | Medicoteknisk tól | 10.000 |
| | Bústovnar til serforsorgina | 1.000 |
| | Umvæling av ráðsbygninginum | 1.400 |
| **§ 15** | **Innlendismál** | **3.000** |
| | Goymslubygningur á Tvøroyri | 3.000 |
| | **Løgur tilsamans** | **229.500** |
| § 5 | Søla av bygningi í Jónas Broncks gøtu | 2.000 |
| § 6 | Søla av landsins ognum | 10.000 |
| § 8 | Søla av íbúðarbygningum hjá Landssjúkrahúsinum | 30.000 |
| § 15 | Søla av Dúgvuni | 3.000 |
| | **Løguúteiðslur tilsamans íroknað søla av løgum** | **184.500** |

## 5.7 Gongdin í skuld landskassans

Langfreistaða bruttoskuld landskassans var 3,6 mia. kr. ultimo 2004. Í 2006 verða 459,4 mió. kr. goldnar aftur í avdráttum, av hesum er avdrátturin til danska ríkiskassan 84,4 mió. kr. og 375 mió. kr. eru afturgjald av lánsbrøvum.

Tað er ásett við lóg, at innlánið hjá landskassanum í Landsbanka Føroya skal vera 15% av BTÚ. Í august í ár var innlánið næstan 1,7 mia. kr. ella næstan 200 mió. kr. omanfyri minstakravið, sí mynd 5.2. Roknað verður við endurfígging við lánsbrøvum á 575 mió. kr. í 2006.

Við verandi lága rentustigi er ætlanin at umfíggjað danska ríkislánið. Árliga sparingin verður mett til 25 mió. kr.

**Mynd 5.2: Gjaldføri landskassans í Landsbanka Føroya**




Kelda: Landsbanki Føroya.